# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Neyðarslig neyðsemja

Politikkur er kynstrið at finna semjur. Men tað finnast eisini semjur, sum verða gjørdar fyri ein og hvønn prís, og tað tykist, sum er búskaparsemjan kring fiskivinnuna ein av hesum.

Undan seinasta løgtingsvali legði Javnaðarflokkurin eina við, at ein reformur á fiskivinnuøkinum var alneyðugur og eitt av kardinalpunktunum í komandi samgongusamráðingum – legitimiteturin undir CHE-samgonguni. Orð, sum vórðu endurtikin, tá Jóannes Eidesgaard helt einastu løgmansrøðu sína sum stjóri í CHE-samgonguni. Men samstundis orð, ið høvdu hug at tagna, tá ABC-samgongan varð skipað av nýggjum.

Seinastu útmeldingarnar kring bústaðarpakkan peika als ikki á nakran reform á fiskivinnuøkinum. Eitt neyðarsligt uppskot um, at óvanligur vinningur innan fiskivinnuna – les vinningur við sølu av kvotum – skal skattast við 27% merkir í veruleikanum, at skattingin av hesum verður einans 9% hægri, enn hon er hjá partafeløgum annars. Og við eini ætlaðari hækkan av partafelagsskattinum minkar sami munur.

Gaman í er hetta frægari enn einki. Og helst fær hetta onga sum helst ávirkan í 2011, nú troyttir stovnar og lágur marknaðarprísur gera sítt fyri at avmarka talið av kvotuhandlum.

9% í eykaskatti er kanska betri enn einki. Men tað liggur langt frá teimum gerðum, ið kundu flutt fiskiveiðina í nær námind tí, sum av flestu frøðingum verður mett lívfrøðiliga og búskaparliga optimalt.

Umframt at finna semjur er politikkur eisini kynstrið at arbeiða móti størri málum enn degnum í morgin, og her hevur Javnaðarflokkurin kiksað við lít hesaferð.

**Sosialurin**

## Visjón og veruleiki

**HEÐIN MORTENSEN**
borgarstjóri, vegna Tórshavnar Býráð



**Túsundtals fólk uttanlands vitja okkara heimasíðu hvønn mánað at kanna umstøðurnar í høvuðsstaðnum. Tey kanna bústaðar- og starvsmøguleikar, ansingarpláss og kollektiva ferðslu. Vit vilja hava hesi heim og fyri fyrstu ferð í býráðsins søgu eru vit einmælt samd um, hvat skal til fyri at røkka málinum um høvuðsstaðin sum ein alheimsgjørdan vakstrardepil.**

Visjónin hjá sitandi býráð er, at Havnin skal vera ein vakstrardepil. Vit hava eina felags fatan av, hvussu kommunan skal vera í framtíðini, og kunnu tí í felag fara undir eina miðvísa menning av høvuðsstaðnum. Gamaní kann onkur siga, at ein visjón, hóast hon er einmælt samtykt, bara er ein visjón, eitt slag av yvirlýsing. Men vit trúgva á, at vit nú kunnu fara undir eina miðvísa menning, sum skal tryggja fólka- og búskaparvøkstur frameftir. Og kann ein felags visjón eggja og kveikja hugin hjá borgarum, fyritøkum og felagsskapum at draga somu línu, so er nógv vunnið á leið okkara at gera Havnina til ein veruligan vakstrardepil.

Vit eru samd um og hava í kanningum fingið staðfest, at fremstu fortreytirnar fyri trivnaði í framtíðini eru búskaparvøkstur og fólkavøkstur. Framskrivingar vísa í ringasta føri eina stóra afturgongd í fólkatalinum. Hesi gongd mugu vit venda og vit halda okkum vita, hvussu vit tryggja vøkstur og trivnað í framtíðini. Týdningarmesta tilfeingið í framtíðini er útbúgvið og skapandi fólk, og tí skal høvuðsstaðurin á øllum økjum gerast so attraktivur sum gjørligt. Øll eiga høvuðsstaðin og hann eigur at ganga á odda í menningini til frama fyri øll. Landið fer bara væl av, at tað gongst høvuðsstaðnum væl.

Tá vit ímynda okkum ein høvuðsstað sum miðstøð fyri lærdómi og vinnumenning, gransking og mentan, so er tað ikki meira ein visjón enn so, at vit langtsíðan eru farin undir at leggja lunnar undir ta menning, sum skal til fyri at skapa fortreytirnar. Vit eru eisini komin rættiliga langt veruliga við at kanna, hvat krevst fyri, at fólk støðast og hvat krevst fyri, at útbúgvið fólk flytir heimaftur eftir lokna útbúgving og royndir uttanlands.

Vit vita, hvat krevst fyri at hava ein sterkan mentanarpall við tónlist, myndlist og aðrari list og eru í fullari ferð í gongd við at skapa neyðugar fortreytir og umhvørvi. Vit byggja og menna sum aldri áður fyri at skapa pallar, har skapanargleðin fær rúmd. Vit gera tað sama innan ítrótt. Vit royna av øllum alvi at hjúkla um tey, sum velja at búgva her. Tað er ikki av tilvild, at fleiri tungumál hoyrast í havnargøtum, vit ynskja hetta margfeldið og vit eru púra samd um, at eitt opið samfelag við tolsemi skapar eitt umhvørvi, sum er merkt av trygd, frælsi og trivnaði, sum náttúrliga dregur fólk til sín.

Tí eru vit í holt við at skapa ein væl skipaðan høvuðsstað og ein býarplan, har fjølbroytt tilboð, spennandi arkitekturur, ein livandi býur og ein kókandi mentanarpallur er ein heilt nátúrligur partur av framtíðini. Vit gera alternativ byggiøki til privat sum vinnu. Vit royna av øllum alvi at fáa burtur allar bíðilistar í sambandi við ansing. Vit royna av øllum alvi at fáa skipað skúlaviðurskifti á øllum økjum, vit hava ávirkan á. Vit fremja umhvørvislig stórarbeiði. So her er ikki bara talan um visjónir, men um ítøkilig arbeiði.

Vit gera regluligar nøgdsemis- og tørvskanningar. Vit síggja t.d., at ofta fleiri enn 10% av teimum vitjandi á heimasíðu kommununar hava bústað í Danmark og aðrastaðni. Kanna vit nærri, hvørjum hesi sóknast eftir, so liggja bústaðarmøguleikar, størv, barnaansing og ferðsluviðurskifti ovast. 10% kunnu vera fleiri hundrað ella túsundtals um mánaðin og tað vísir okkum, at tað eru fólk uttanlands, ið hava áhuga fyri og regluliga kanna viðurskiftini í høvuðsstaðnum, møguliga við ætlanum at flyta higar. Og eg haldi hetta er fyrstu ferð, at allir býráðslimir einmælt hava samtykt at samstarva breitt innansum uttanlands fyri at skapa ta neyðugu menningina, og at nøkta tann tørv, hesi hava.

Uppskriftin er púra greið. Havnin skal hava ein munandi búskaparvøkstur, sum verður grundarlag undir fólkavøkstrinum. Tí skal vinnulívið hava bestu kor. Vit skulu satsa uppá gransking og mentan. Tí skulu vit skapa teir karmar, sum eru neyðugir fyri, at hesi fólk trívast. Tað er ikki meira innviklað enn tað.

Vit kanna, hvat tørvurin er, og vit gera okkara besta at nøkta tørvin. Tí eiga vit als ikki at góðtaka, at fólkatalið stendur í stað – kappingin á framtíðar altjóða marknaðinum verður ikki um olju og fisk, men um útbúgvið fólk. Tí er stóri dreymur okkara, at t.d. granskarar uttanlands fara at leita sær hendavegin at luttaka í skúlaskapi, gransking og vinnumenning. Tí í kjalarvørrrinum á hesum blóma stuðulstænasturnar, sum skapa lív millum vitjandi og búgvandi.

Í tilgongdini til visjónina hava vit samstarvað við vinnulív, arbeiðsmarknað og vitanarstovnar í samfelagnum. Hetta neyva samstarv verður eins neyðugt, nú vit fara undir at avgera, hvussu vit føra visjónina út í lívið. Tað er gott at hava visjónir og at seta sær nøkur mál at arbeiða fram ímóti. Men visjónin er bara yvirlýsingin um ætlaninar. Í okkara føri kunnu vit tó fegnast um, at fleiri av okkara átøkum eru í tráð við visjónina. Vit 13 í býráðnum eru ikki samd um, hvussu vit skulu røkka øllum málum, men vit eru samd um at røkka teimum. Og ongantíð áður hava vit verið so samd. Vit vilja, at Havnin skal tæna øllum landsins borgarum í sínum avgerandi leikluti at ganga á odda í menningini.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Jaspur Langgaard jaspur@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.